# Hátíðarhald í Runavík



*Fyristøðumaðurin á ellis- og røktarheiminum Tordur Niclasen saman við Jógvani Davidsen og børnunum Dianu, Hjørdis og Stig*

*Myndir: AWJ-Foto*

Hátíðarhald var á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi í Runavík sunnudagin 7. februar í sambandi við at eitt av búfólkunum, Jógvan Davidsen úr Elduvík, fylti 100 ár.

Tað var familjan, Eysturoyar Røktar-og ellisheim og Runavíkar kommuna ið skipaðu fyri hátíðarhaldinum.

Nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á Jógvan hendan dagin, bæði familja, almenn umboð, stýrislimir á heiminum og umboð fyri bý- og bygdaráðini í Eysturoynni.

Jógvan var føddur 7. februar 1910 í Haldarsvík, men flutti sum tvey ára gamal til Elduvíkar at búgva hjá mostur síni. Í 1937 giftist Jógvan við Gerdu Jacobsen úr Thisted. Tey búsettust í Keypmannahavn og fing trý børn: Dianu, Stig og Hjørdis. Gerda andaðist í 1970, og í 1983 flutti Jógvan aftur til Elduvíkar at búgva.

Í sambandi við føðingardagin komu fleiri í familjuni úr Danmark til at hátíðarhalda 100 ára føðingardagin saman við Jógvani. Umframt børnini eigur Jógvan eisini seks abbabørn og átta langabbabørn.

*- red*



*Dótturin Diana lesur heilsanina frá drotningini*



*Sonurin Stig sigur nøkur orð um pápan*





*Stjórin á Almannastovuni, Petra Johnsdóttir Joensen, og borgarstjórin í Runavíkar Kommunu, Magnus Rasmussen, halda røðu*




*Jógvan saman við familjuni*

Hesin sangur varð yrktur av búfólkum og starvsfólkum á røktar- og ellisheiminum í sambandi við føðingardagin.

## Kvøða til Jógvan

**7. februar 2010**

*Lag: Fjallarósan....*

*Góði Jógvan vit tær kvøðu bera*
*100 ár – hvør skuldi hesum trúð*
*komin uppá ársins hægstu tindar*
*fáum unnist hetta – eins og tú.*

*Tú í Haldórsvík í heim varð borin*
*systkin trý tit taldust har í búð*
*tó bert tvey ár vart tú har í heimi*
*flutti so til Elduvíkar - tú.*

*Har ið barnaskógvar vórðu slitnir*
*trygt og fjálgt var nýggja heimi í*
*"beiggja" fekk – hann Alfred hevur navnið*
*gingu tit á fjøllum og í líð.*

*Níggju ár - tá rakti sorgarbylgja*
*misti "pápan" – stóra ábyrgd fekk*
*Elduvík hon misti synir djarvar*
*fimm í tali – bátur burtur gekk.*

*Ungur tú við Íslands strendur royndi*
*14 ára gamal – heimanfrá*
*baks tað var á "Suðurlandi" mangan*
*støðugt standa vaðbeini íhjá.*

*Hugur tín til skúlabonk so leitar*
*leiðin hon til "TUXAM" beint so gekk*
*har í Kongens København tú støðist*
*lærir smiðju fakið – prógvið fekk.*

*Tit í Valby valdi so at búgva*
*Tú og Gerda - trúgv við tína lið*
*børnini tey blivu trý í tali*
*tær Diana, Hjørdis og hann Stig.*

*Hugurin til sjógvin mundi standa*
*hóast arbeiði á landi fekk*
*mangan túrin mundi tú við "NAJU"*
*yvir havið – støðugt leiðin gekk.*

*Fimti ár í útlegd mundi vera*
*so til Føroyar leiðan aftur gekk*
*"gomul kerligheit" – hon ei man rusta*
*tú í Elduvík so Elspu fekk.*

*Hugaligt tað er at hava Jógvan*
*her hjá okkum – júst á hesum stað*
*mildur hann – og eisini kann skemta*
*vit for vist, tað mangan hava sæð.*

*Góði Jógvan, komin er at enda*
*henda kvøða øllum okkum frá*
*ynski vára er, at Harrin signar*
*hvønn ein dag – Hann letur teg at fáa!*